

# Fáa sekkin við sms

Altsamt fleiri danskar fyritøkur brúka sms-boð, tá tær skulu siga starvsfólki frá, at tey eru uppsøgd. Blaðið JydskeVestkysten nevndi í gjár eitt dømi um, at ein arbeiðsgevari í Suðurjyllandi hevði sagt 14 starvsfólkum, og at tey høvdu fingið uppsøgnina við sms-boðum. Mannagongdin er lóglig, men fakfelagið HK, sum er tað størsta í Danmark, heldur lítið um framferðina hjá arbeiðsgevarunum. Arbeiðsgevararnir verja seg við, at tann, sum verður uppsagdur, skal hava boðini so skjótt, sum til ber, og at sms-boð er tann skjótasti og lættasti fráboðanarhátturin.



*- Tað vísir seg, at tá eg havi verið nokso kontantur, eru úttalilsini farin sum ein boomerang. Hesi trý árini havi eg gjørt mær nakrar erfaringar, sum eg trúgvi fara at koma mær og øllum felagnum til góðar hesi komandi trý árini, sigur afturvaldi formaðurin í Fiskimannafelagnum, Jan Højgaard*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

> *... uppá stutt sikt er tað eftirlønin, sum vit fara at taka hond um, og upp á longri sikt er tað okkara ynski, at fiskimenn hava frí um jólini. Ynski er, at ísfiskaskipini liggja um jólini og millum jól og nýggjárs..."*
>
> *(Jan Højgaard)*

- Eg trúgvi kortini, at hesi trý árini havt lært meg at vanda mær meiri um orðavalið. Tað, eg havi sagt, generar ikki meg, men tað kann sjálvandi órógva onnur. Tað vísir seg, at tá eg havi verið nokso kontantur, so eru úttalilsini farin sum ein boomerang. Hesi trý árini havi eg gjørt mær nakrar erfaringar, sum eg trúgvi fara at koma mær og øllum felagnum til góðar hesi komandi trý árini, sum liggja fyri framman, sigur hann og leggur aftrat, at hann neyvan fer at leypa framav, soleiðis sum hann ásannar, at hann onkuntíð hevur gjørt í óðum verkum.

## Standa saman

Jan Højgaard heldur, at høvuðsorsøkin til, at tvídrátturin í leiðsluni gjørdist so stórur í heyst og í vetur, var, at formansvalið stundaði til.

- Nú er valið av, og eg ivist onga løtu í, at samanhaldið í leiðsluni verður nógv betri, enn seinasta tíðin hevur víst.

Afturvaldi formaðurin er til reiðar at leggja tað farna aftur um seg, og hann ivast heldur onga løtu í, at tað fara hinir í stjórnini, sum tvídráttur hevur verið við, eisini at gera.

- Vit fara nú undir eitt nýtt skeið í felagnum, og eg havi góðar vónir um, at vit fáa trý fruktargóð ár – fiskimonnum at frama.

Jan Højgaard leggur dent á, at eitt er, at stjórnin, sum er leiðsla felagsins, fer at standa saman um tey mál, sum liggja fyri framman, men hann vónar eisini, at tað fer at eydnast felagnum í enn størri mun at fáa fiskimenn at standa saman um felags mál.

- Nú hava vit einki at berjast um innanhýsis, og tí fara vit at brúka allir góðar kreftir til at stríðast fyri okkara limum. Eg fari í hvussu er at gera mítt besta til at røkka tí máli, sum felagið hevur, bæði í leiðsluni og út til okkara limir, sigur afturvaldi formaðurin.

## Eftirløn fremst

Spurdur, hvørji mál liggja frammarlaga hjá honum sum formanni og hjá felagnum, nú skjótil verður settur á eitt nýtt 3-áraskeið, sigur Jan Højgaard:

- Uppá stutt sikt er tað eftirlønin, sum vit fara at taka hond um, og upp á longri sikt er tað okkara ynski, at fiskimenn hava frí um jólini. Ynski er, at ísfiskaskipini liggja um jólini og millum jól og nýggjárs.

Formaðurin ásannar, at hetta eisini var hansara ynski, tá hann varð valdur á valinum fyri trimum árum síðan, og tí ásannar hann, at hetta ivaleyst verður nakað, sum kemur at taka tíð.

Upp á fyrispurningin, um Fiskimannafelagið kundi hugsað sær broytingar í sáttmálum í hesi skeiði, sum nú byrjar, sigur Jan Højgaard, at sáttmálaviðurskifti er nakað, sum hugt verður eftir alla tíðina.

- Hetta er nakað, vit taka upp, tá vit í leiðsluni eru savnaðir. Hetta taka vit so hvørt, sum tað kemur, sigur formaðurin.



*- Jú, eg dugi væl at síggja, at eg í onkrum føri kundi havt orðað meg eitt sindur øðrvísi. Men eg veit, at tað eisini eru fiskimenn, sum hava dámt mín kontanta máta at siga tingini upp á, sigur Jan Højgaard*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Royndur í leikum

At enda spurdu vit afturvalda formannin, um hann hevur tosað við avbjóðaran, Henrik Old, eftir at valúrslitið fyrilá.

- Nei, eg havi ikki vent mær til hansara, men eg trúgvi ikki, at Hendik Old fer at bera nag til mín fyri hansara ósigur. Hann er royndur í leikum, og eg ivist onga løtu í, at hann kemur yvir hetta, sigur Jan Højgaard.